## Suðuroyingar fara at ganga við stavum

**Tað heilt stóra mótaherðindi í løtuni er at ganga við skíðstavum og hóskvøldið verður stavgonga á Tvøroyri**

RØRSLA

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

At ganga við skíðstavum er tað heilt stóra mótaherðindi í løtuni. Og nu taka tey eisini táttin upp á Tvøroyri

Hóskvøldið skipar Kunningarstovan á Tvøroyri fyri gonguferð, sum serliga er ætlað teimum, sum ganga við skíðstavum. Men Kunningarstovan leggur dent á, at fólk er meiri enn vælkomin við, hóast tey ikki hava skíðstavar.

Gonguferðin byrjar hóskvøldið klokkan 18 undir garðinum við sjúkrahúsið og ætlanin er at ganga inn til viðarlundina.

Tey, sum ganga við stavum siga, at tað er nakað heilt serligt, tí tað fæst nógv meiri rørsla burturúr at ganga við stavnum enn við vanligari gongu. Tað er tí, at við stavum eru tað ikki bara beinini, sum verða brúkt, men eisini armarnir og allir yvirrkoppurin og tað gevur nógv meiri motión.

Einir bíligir skíðstavir fáast fyri einar 100 krónur, men teir fáast eisini dýrari- og betri- fyri einar 500-600 krónur.

# Hóttan um verkfall máa støðið undan einum góðum samstarvi

**– Vit hava havt gott samstarv við -sjúkrarøktarfrøðingarnir á Landssjúkrahúsinum, men hóttanin um verkfall máar støðið undan einum góðum samstarvi, sigur Poul Geer Hansen, sjúkrahússtjóri**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Leiðslan á Landssjúkrahúsinum letur seg ikki trýsta av hóttanum um verkfall, men tað er avgjørt heldur ikki ætlanin at fara í kríggj við sjúkrarøktarfrøðingar, sigur Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum*

– Vit lata okkum ikki trýsta av hóttanum um verkfall. Men hinvegin ætla vit okkum heldur ikki í stríð við sjúkrarøktarfrøðingarnar.

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum, heldur, at tað er ógvuliga óheppið, at sjúkrarøktarfrøðingarnir hótta við verkfalli, verða ætlaðu umleggingarnar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum settar í verk.

Ætlanin er at nakrir sjúkrarøktarfrøðingar skulu missa størvini og at ljósmøður skulu yvirtaka tey. Ljósmøðurnar ganga á vakt kortini, men sum er, verða tær bara tilkallaðar, tá ið kvinnur skulu eiga. Við at lata tær taka lut í vanliga arbeiðnum, heldur leiðslan seg fáa størri nyttu burturúr arbeiðsmegini, samstundis sum tænastustøðið hækkar, tí nú fær ljósmóðurin verið um barnakonurnar í eitt longri tíðarskeið.

Sjúkrarøktarfrøðingarnar taka hetta sum onki minni enn eina krígsavbjóðing og tær hava gjørt greitt, at tær eru tilreiðar at taka øll neyðug stig fyri at forða fyri umleggingunum.

– Vit ætla okkum ikki í kríggj við sjúkrarøktarfrøðingarnar og tað er heldur ikki endamálið við ætlaðu umleggingunum, sigur Poul Geert Hansen.

### Máar støðið undan góðum samstarvi

Hann vísur á, at umleið helvtin av starvsfólkunum á Landssjúkrahúsunum eru sjúkrarøktarfrøðingar og at tað hevur verið eitt gott samstarv við tey.

– Tí er tað ógvuliga óheppið, at tær seta hetta málið so hart upp, sum tær gera. Tað er teirra val, men øll fakfeløg eiga at vera opin fyri broytingum og at leiðslan hevur rætt til at gera broytingar, uttan at vera hótt við verkfalli.

– Slík framferð máar støðið undan góðum samstarvi, sigur stjórin á Landssjúkrahúsinum.

Hann sigur, at sum málið liggur í løtuni, stendur leiðslan fast um, at ætlaðu umleggingarnar á føðideildini eru tær røttu at gera.

Men hann leggur samstundis dent á, at avgerðin er ikki tikin enn.

– Málið er í løtuni til hoyringar. Tá ið freistin er úti, verða hoyringssvarini viðgjørd og so verður endalig støða tikin, sigur hann.

Verður endaliga avgerðin, at umleggingarnar verða framdar, fer leiðslan at kenna ábyrgd mótvegis sjúkrarøktarfrøðingunum á føðideildini og at royna at finna teimum, sum missa starvi, pláss aðrastaðni á Landssjúkrahúsinum.

Kortini heldur hann, at tað er altíð trupult at viðgera eitt mál, tá við eini verkfalshóttan hangandi yvir høvdinum.

Hann sigur eisini, at umleggingarnar á føðideildini eru ikki gjørdar í fara ikki at lækka støðið á føðideildini og ætlanin er als ikki, at deildin heilt verður drenað fyri sjúkrarøktarfrøðingar, tí eftir ætlan skulu tað verða umleið helvt um helvt sjúkrarøktarfrøðingar og ljósmøður til arbeiðis á føðideildini.

Hóast avgerð ikki er tikin enn ger Poul Geert Hansen púra greitt, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum letur seg ikki hótta til at taka ávísar avgerðir,tí so verður tað ómøguligt at virka sum leiðsla.

– Men tað er heldur ikki eitt mál hjá okkum at fara í kríggj við sjúkrarøktarfrøðingarnar, tí tað ætla vit ikki, sigur stjórin á Landssjúkrahúsinum.

# Ætla at gera fleiri grundstykki út á Tvøroyri

**Tvøroyrar Kommuna ætlar nú at keypa eina stóra trøð mitt á Tvøroyri til grundstykki**

ÚTSTYKKING

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tvøroyrar Kommuna arbeiðir nú við at útvega eitt stórt øki til grundstykki.

Tað er ikki á hvørjum degi, at Kommunan á Tvøroyri hevur grundstykki at bjóða fólki, sum vilja byggja og tað eru enntá tey sum siga, at hetta er fyrstu ferð í yvirhøvur, at kommunan fer undir eina útstykking í stórum mátistokki.

Tað er nú nakað síðani, at Tvøroyrar Kommuna keypti 6000 fermetrar av Heiðatrøðini miðskeiðis á Tvøroyri, beint við Keypsamtøkuna.

Ta ferðina var ætlanin at fara undir íbúðarbygging á Trøðini.

Men tað datt niðurfyri og nú ætlar Kommunan eisini at keypa, tað, sum eftir er av Heiðatrøðini.

Tilsamans er Heiðatrøðin einar 20.000 fermetrar til støddar, so tað eru einir 14.000 fermetrar, sum kommunan nú ætlar at samráðast við eigaran um at keypa, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Borgarstjórin metir, at tað verða eini 30 grundstykki á Heiðatrøðini. Men spurningurin er um ein partur av trøðini skal brúkast til almenn endamál.

– Tað er ikki avgjørt enn, men eitt, sum hevur verið frammi, er at seta ein part av trøðini av til ætlaða heilsuskúlan á Tvøroyri, sigur Kristin Michelsen.

# Konglig vitjan í Suðuroy

**Tað er nú greitt, at tey kongligu eisini fara at vitja í Suðuroy, tá ið tey koma til Føroya í summar**

KONGLIG VITJAN

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Hóast tað ikki enn er likið nógv út um skránna, tá ið kongshúsið kemur til Føroya á vitjan í summar, er tað í øllum førum greitt, at Suðuroyggin stendur á skránni hjá teimum kongligu.

Kongshúsið vitjar í Føroyum í døgunum frá 21.-23. juni í summar og við í ferðini eru bæði Margretha, drottning, Heindrikkur, prinsur, Fríðrikkur, krúnprinsur og Mary, prinsessa.

Á kommunustýrisfundum í Suðuroy eru kommunustýrini kunnað um, at tey kongligu koma til Vágs fyrrapartin týsdagin, 21. juni við kongsskipinum, Dannebrog.

Í Vági skulu tað hava eina málttíð, áðrenn tey koyra norður á Tvøroyri. Á Tvøroyri eta tey døgverða um kvøldið, áðrenn tey fara avstað aftur av Tvøroyri við kongsskipinum.

Bæði í Vági og á Tvøroyri skulu tey hyggja eftir ymsum. Eitt nú er tað greitt, at á Tvøroyri skulu tey vitja í krambúðini hjá Thomsen, sum er gamal, kongligur handil og søguligt pláss yvirhøvur.

Annars er ætlanin at tey skulu vitja víða um landið og tá ið tey koma á Vág við kongsskipinum, verður tað av Sandi, so har vitja tey eisini.

*Tá ið tey kongligu koma til Føroyar í summar, skulu tey eisini vitja í Suðuroy*

